## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av norði, seinnapartin minni vindur. Sólglottar, men eisini okkurt ælið, partvís kavi. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fyrrapartin lot av norði, seinnapartin upp í stívt andøvsgul av landsynningi. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 2 og 5 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og eystri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 4 og 8 stig.

# Aftur mannfólkastripp í Føroyum

**Um vikuskiftið hava føroysku konufólkini aftur møguleikan at fara ein túr í býin og uppliva nøkur vælvand mannfólk, sum blaka klæðini frammanfyri teimum**

UNDIRHALD
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað er nýggja ítróttarkaféin og diskotekið Cippo, ið hevur fingið tveir mannligar stripparar úr Danmark á vitjan um vikuskiftið. Tað hava áður verið onkrir mannligir stripparar á vitjan her á landi, men nú eru nøkur ár síðani seinastu vitjanina.

### Trupult at fáa fatur á

Teir báðir strippararnir, Daniel og Alex, sum teir verða róptir, fara at framføra bæði fríggjakvøldið og leygarkvøldið. Serliga Daniel er ein kendur strippari í Danmark, og hann hevur fleiri ferðir vunnið danska meistaraheitið í mannfólkastripp.

Rúni Djurhuus, sum eigur og rekur Cippo, sigur, at nú á døgum er tað ógvuliga trupult at fáa fatur á mannligum stripparum í Danmark, tí teir eru so fáir í tali. Tí eru teir á Cippo ómetaliga fegnir um, at tað hevur eydnast teimum at fáa ikki minni enn tveir slíkar hendan vegin.

Eisini sigur Rúni, at orsøkin til at skipa verður fyri mannfólkastripp júst hetta vikuskifti er, at fótbóltskappingin endar, og tað hevur stóran áhuga millum mannfólk. Tí helt Rúni, at hann skuldi skipa fyri onkrum, sum konufólkini kundu fara til, meðan menninir ganga í einum fótbóltsrúsi.




*Nú bjóðar Rúni Djurhuus, sum eigur og rekur ítróttarkaféina og diskotekið Cippo, føroysku konufólkunum til fyrsta flokks mannfólkastripp í vikuskiftinum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | 1 |
| Qaqortoq | 12 |
| Ammassalik | 3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 8 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 15 |
| Tromsø | 2 |
| Bergen | 8 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 9 |
| Keypmannah. | 12 |
| Helsinki | 9 |
| Moskva | 6 |
| Berlin | 10 |
| Warzawa | 9 |
| Kiev | 5 |
| Bukarest | 11 |
| Paris | 18 |
| Madrid | 18 |
| Róm | 16 |
| Malorca | 23 |
| Athen | 18 |
| Malta | 21 |
| Tunis | 29 |
| Beijing | 16 |
| New Dehli | 28 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 20 |
| New York | 19 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 29 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 31 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 994 hPa. við Hebridurnar grynnist. Brúgvalagið haðani nærkast Føroyum fríggjanáttina.




**Í dag:**
Kuldabrúgvin sunnan fyri Føroyar fer suðureftir. Hátrýstið yvir Grønlandsfjørðinum stendur mestsum í stað og eystanfyri hátrýstið rekur køld luft av norði móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 17/10 kl. 06[00]– 16/10. 06[00]. Hitin í gjár: 10,1°
Minsti hiti máldur í okt.: - 4,0° - Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 17/10 kl. 06[00]– 18/10 kl. 06[00]
Avfallið higartil í oktober: 81,8 mm

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

Sosialurin

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 14. oktober | Mánin næstur jørðini |
| 17. oktober | Fullmáni |
| 25. oktober | Seinna kvarter |
| 26. oktober | Mánin longst frá jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Mykinesfirði fp. | Mykinesfirði sp. | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvannasundi fp. | Hvannasundi sp. | Fugloyarfirði fp. | Fugloyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 21. Okt. | 10.13 | 22.39 | 09.13 | 21.39 | 09.28 | 21.54 | - | 12.13 | 00.46 | 13.13 | 08.28 | 20.54 | 07.28 | 19.54 | 10.28 | 22.54 | 11.28 | 23.54 | 09.58 | 22.24 | 11.13 | 23.39 |
| 22. Okt. | 11.06 | 23.32 | 10.06 | 22.32 | 10.21 | 22.47 | 00.39 | 13.06 | 01.39 | 14.06 | 09.21 | 21.47 | 08.21 | 20.47 | 11.21 | 23.47 | - | 12.21 | 10.51 | 23.17 | - | 12.06 |
| 23. Okt. | 11.59 | - | 10.59 | 23.25 | 11.14 | 23.40 | 01.32 | 13.59 | 02.32 | 14.59 | 10.14 | 22.40 | 09.14 | 21.40 | - | 12.14 | 00.47 | 13.14 | 11.44 | - | 00.32 | 12.59 |
| 24. Okt. | 00.25 | 12.51 | 11.51 | - | - | 12.06 | 02.25 | 14.51 | 03.25 | 15.51 | 11.06 | 23.43 | 10.06 | 22.43 | 00.40 | 13.06 | 01.40 | 14.06 | 00.10 | 12.36 | 01.25 | 13.51 |
| 25. Okt. | 01.28 | 14.06 | 00.28 | 13.06 | 00.43 | 13.21 | 03.28 | 16.06 | 04.28 | 17.06 | - | 12.21 | 11.21 | 23.57 | 01.43 | 14.21 | 02.43 | 15.21 | 01.13 | 13.51 | 02.28 | 15.06 |

5 707265 100050 >